# Havnar Bio

kall Coca-Cola

UMMÆLI:

# Lord of the King Kong



## -Peter Jackson fer eftir fleiri Oscarvirðislønum við King Kong

*Kim Simonsen*

Ein og hvør endurinnspæling er altíð spennandi, serliga um tað er "King Kong" og leikstjórin er Peter Jackson (f. 1961). Fólk vóru einaferð í iva, um hann megnaði at lyfta uppgávuna at gera teir tríggjar "Ringanna Harri" filmarnar, nú situr allur filmheimurin í spenningi og bíðar eftir at fáa veruligu søguna um King Kong.

Jackson er farin nógv aftur síðani vit sóu hann seinast. Eg kendi ikki mannin aftur á myndunum sum Universal hevur sent út av honum í pressutilfarinum. Fyrr var hann nógv meiri rundur. Nú líkist hann ikki longur einum tjúkkum hobba.

Jackson kom at skriva filmsøgu við stóru filmatiseringini av Ringanna Harra, fyri hetta stóra arbeiði fekk hann, og tey sum arbeiddu saman við honum, 17 Oscarvirðislønir, 12 enskar British Academy of Film and Television virðislønir og 4 Golden Globe Virðislønir. Við King Kong kemur hann at fáa hópin av virðislønum eisini, her er helst eingin ivi.

Hin newzealendski Peter Jackson arbeiddi tá við 2000 teknikarum í 7 ár. Í onkrum parti vóru 20.000 statistar. Sjálvur skuldi hann ikki ferðast so langt frá familjuni, tí allar upptøkurnar vóru gjørdar í vakra heimlandi hansara New Zealandi.

### Ein serligur filmur fyri Jackson

Trygdarkrøvini hava verið stór kring King Kong filmin, og felagið Universal og UIP (United International Pictures) hava økt um spenningin.

Vit vita eisini, at filmanir um King Kong hava haft ein serligan týdning fyri Peter Jackson. Hann var ikki meiri enn átta ár, tá hann sá hendan filmin fyrstu ferð, og eftir hetta visti hann, at hann skuldi gera film. Longu sum barn royndi Jackson at gera ein film um King Kong. Hann bygdi The Empire State Building í papp og gjørdi eina Kong dukku av jakkanum hjá mammu síni.

Í 1996 royndi Peter Jackson seg aftur við einum handriti til ein film um King Kong. Men sum so ofta í Hollywood, so var hendan ætlan av ongum. Hetta árið komu bæði "Mighty Joe Young" og drekin "Godzilla". Hetta gjørdi, at Jackson fór ein annan veg, og hesin vegurin endaði við Ringana Harri, sum komu í 2001, 2002 og 2003.

### 1933-2005

Fyrsti King Kong filmurin er frá 1933. Seinastu ferð hann var gjørdur var í 1976. Í 2005 sleppur Petur Jackson so at gera sín dreymafilm um King Kong. Nú hevur hann fingið so stóra viðgongd, at hann kann sjálvur velja hvat hann ger, tá tað hendir, so kemur mangan okkurt ordeliga lekkurt burtur úr. Líkasum tá Luc Besson gjørdi "The Fifth Element" (1997), við m.a. Bruce Willis.

Peter Jackson hevur sjálvur sakt í pressutilfarinum hjá Universal, at hann valdi at fáa Carl sum Jack Black at líkjast leikstjóranum Orson Welles. Ein maður við einari óhugnaligari sjálvgóðsku, altíð við einari kenslu av at hann hevur uppiborið heimsins viðurkenning: "Men undir reypinum er ein gjógv av ótta, serliga fyri at hansara ætlanir ongantíð skulu gerðst veruleiki".

Jackson byrjaði at gera film í New Zealandi, serliga vóru tað ræðufilmar, ið høvdu hansara áhuga. 12 ára gamal gjørdi hann ein krígsfilm í úrtagarinum hjá foreldrunum. Seinni gjørdi hann filmin Bad Taste, ið gjørdist væl umtóktur, serligani á Cannes Filmstevnuni, og tí seldur til 30 lond. Hann hevur eisini gjørt filmin Braindead, ið mong halda er hin mest blóðdálkaði filmurin nakrantíð, hetta er ein ordans "splattur" filmur. Slíkir filmar eru fyri tey flestu púra ørir í høvdinum, men tey sum dáma hetta stuttleika sær óført. Hetta sást aftur í Ringana Harra, har partar vóru óhugnaligir. King Kong er uppá allar mátar eins óhugnaligur og spennandi sum hesir filmar.

TÍÐIRNAR:

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu




## King Kong

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 16.12 | kl. 19.00 | kl. 22.45 |
| Leygardag | 17.12 | kl. 19.00 | kl. 22.45 |
| Sunnudag | 18.12 | kl. 18.30 | kl. 22.15 |




## Just like Heaven

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 16.12 | kl. 23.15 |
| Leygardag | 17.12 | kl. 23.15 |
| Sunnudag | 18.12 | kl. 21.45 |




## I dine sko

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 16.12 | kl. 20.30 |
| Leygardag | 17.12 | kl. 20.30 |
| Sunnudag | 18.12 | kl. 19.00 |




## Peddersen og Findus - Nissemaskinen

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 16.12 | kl. 18.30 |
| Leygardag | 17.12 | kl. 18.30 |
| Sunnudag | 18.12 | kl. 16.30 |

KOMANDI FILMUR:

*FRUMSÝNING*

## Narnia - Løven, Heksen og Garderobeskabet

Mánadag 26.12

www.bio.fo • Telefon 31 19 56